# Einalærarastarv í Sandvíkar skúla

Tíðaravmarkað starv sum einalærari, fyri lærara í barnsburðarfarloyvi, í Sandvíkar skúla verður lýst leyst til setanar frá 1. august 2005 og 24 vikur fram. Starvstíðin verður møguliga longd, um farloyvistíðin verður longd.

Sandvíkar skúli hevur komandi skúlaár 5 næmingar í 1.-4. flokki.

**Um starvið**
Einalærarin undirvísir í øllum lærugreinum og hevur fyrisitingarligu ábyrgdina av skúlanum.

**Søkt verður eftir einum einalærara, sum**

- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av dagligu undirvísingini
- skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim
- skal vera førur fyri at loysa trupulleikar og at samstarva
- skal eggja næmingum og foreldrum at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt.

Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag í lønarflokkunum 21.2.-30.2.

Umsókn saman við prógvi, C. V. o. ø. skal vera Sandvíkar skúla í hendi í seinasta lagi 2. juni 2006 kl. 16.00.

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar til starvið, kunnu ringja til einalæraran Nitu Næs á tlf. 375917.

# Børn sum brúka hoyritól

Leygardagin 20. mai kl. 15.00 skipar foreldrafelagið Hoyrnin fyri eini hugnaløta í Deyvahúsinum fyri børnum sum brúka hoyritól og foreldrum teirra.

Jutta Helgadóttir frá Hoyriklinikkini fer at greiða foreldrunum frá tí nýggjasta innan økið, og annars svara spurningum.

Maria Gram fer at tosa við børnini og tey ungu, har hon fer at geva teimum eitt sindur av lívserfaringum, við serligum denti á, hvussu tey kunnu styrkjast í degligdegnum.

Vit enda dagin við at eta pizza saman.

**Foreldrafelagið Hoyrnin**

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktarfrøðingar til Psyk. D1

Vegna barnsburðarfarloyvi er eitt avloysarastarv á starvsbrøki 0,7 leyst at søkja til setan 1. juni 2006 til og við 15. november 2006 og eitt farloyvisstarv á starvsbrøki 0,5 er leyst at søkja frá 1. juni til og við 31. august 2006.

Deildin er ein opin 5 daga psykiatrisk móttøkudeild við 14 seingjarplássum. Arbeiðið er skipað eftir kontaktpersónsskipanini og eru vit í gongd við at innarbeiða kognitiva viðgerð sum arbeiðshátt. Vit raðfesta samstarvið, trivnaðin og fakligu menningina høgt. Arbeiðsumhvørvið er avbjóðandi og spennandi.

**Krøv til umsøkjaran**

- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- royndir og fakligan áhuga innan psykiatrisku sjúkrarøktina
- góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða**

- góða innleiðslu
- eitt dynamiskt, fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samstarv

**Løn og setanartreytir** smb. sáttmálan millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

**Nærri fæst at vita** um starvið við at ringja til deildarleiðaran, Jóngerð M. Nielsen á telefon 304500, lokal 4021, e-post: jomani@lsh.fo ella leiðandi sjúkrarøktarfrøðingin, Bergit Weihe, lokal 4102, e-post: bergitw@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 1. juni 2006 kl. 12.00
*Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á Lønar- og Starvsfólkadeildini áðrenn freistin er úti.*

**Skrivlig umsókn,** merkt »umsókn til starv« við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna "starvsfólk"*

# Til sølu

Traðarstykki í Trøðini í Hovi, umleið 3100 fermetrar við ástandandi úthúsi, til sølu. Ognin verður seld til hægstbjóðandi yvir kr. 115.000,00.

Boð skulu verða okkum í hendi innan 1. juni 2006.

**Lions Club Suðuroy**
Tlf. 371097 ella 227533

**VINNUMÁLARÁÐIÐ**

# Lýsing

**Í sambandi við at Føroya Landsstýri fer undir at einskilja fyritøku landsins, vil Vinnumálaráðið hervið kunngera**

**Umbøn um tilboð uppá ráðgeving í sambandi við sølu av almennum partabrøvum hjá P/F Atlantic Airways**

**P/F Atlantic Airways**
Vinnumálaráðið er farið undir fyrireikingar at selja 33% av partabrøvunum í P/F Atlantic Airways.

Vinnumálaráðið leitar sær nú ráðgeving í sambandi við komandi søluna av partabrøvunum og uppgávuna at skráseta felagið á føroyska virðisbrævamarknaðinum (ICEX). Lýst verður í føroyskum og útlendskum bløðum. Lýsing av ætlanini og listi yvir treytir/krøv frá Vinnumálaráðnum í sambandi við tílíka ráðgeving fyriliggur og verður sent til partar, ið ynskja at lata inn tilboð. Áheitan um hetta skal vera Vinnumálaráðnum í hendi innan 30. mai kl. 16.00.

**Umbøn um tilboð uppá ráðgeving í sambandi við sølu av almennum partabrøvum hjá P/F Føroya Lívstrygging**

**P/F Føroya Lívstrygging**
Vinnumálaráðið er farið undir fyrireikingar at selja 50% av partabrøvunum í P/F Føroya Lívstrygging.

Vinnumálaráðið leitar sær nú ráðgeving í sambandi við komandi søluna av 50% av partabrøvunum til ein ella fleiri íleggjarar. Tilboð ynskjast frá føroyskum og útlendskum ráðgevum. Lýsing av ætlanini og listi vyir treytir/krøv frá Vinnumálaráðnum í sambandi við tílíka ráðgeving fyriliggur og verður sent til partar, ið ynskja at lata inn tilboð. Áheitan um hetta skal vera Vinnumálaráðnum í hendi innan 30. mai kl. 16.00.

**Samband**
Keyparin av ráðgevauppgávunum er Vinnumálaráðið, ið eisini varðar av almennu fyritøkunum, ið skulu seljast. Adressan hjá Vinnumálaráðnum er: Tinganes, Postsmoga 377, FO-110 Tórshavn, Føroyar. Tlf. 356060, Fax 356065, teldupost: vmr@vmr.fo

# Íbúð til leigu

Íbúðin Niðaraveg 2 Inni á Gøtu í Hoyvík er til langtíðarleigu.

Íbúðin er bygd 2001, er 87 fermetrar til støddar og í 2 hæddum.

Íbúðin umfatar køk, stovu, wc, baðirúm, 3 sovikømur, vaskirúm og gongsøki.

Húsaleigan er sett til kr. 7.000,- pr. md., umframt el og hita.

Áhugað biðjast venda sær skrivliga til:

**P/F Poul Michelsen**
Hoyvíksvegur 74
FO-100 Tórshavn